## Dystaryvirlit

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 18.06 | EB/S-B71 | Jens Petur Brattalíð |
| 18.06 | Víkingur-ÍF | Ransin N. Djurhuus |
| 18.06 | HB-KÍ | Páll Augustinussen |
| 18.06 | Skála-B36 | Lars Müller |
| 19.06 | NSÍ-B68 | Eiler Rasmussen |

**Formula-deildin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 9 | 7 | - | 2 | - | 0 | 21 | 8 | 13 | 23 |
| 2 HB | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 22 | 8 | 14 | 19 |
| 3 B36 | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 14 | 5 | 9 | 19 |
| 4 NSÍ | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 14 | 13 | 1 | 15 |
| 5 Víkingur | 10 | 3 | - | 3 | - | 4 | 16 | 14 | 2 | 12 |
| 6 KÍ | 10 | 2 | - | 5 | - | 3 | 13 | 17 | -4 | 11 |
| 7 B68 | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 8 | 12 | -4 | 11 |
| 8 ÍF | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 14 | 22 | -8 | 10 |
| 9 Skála | 10 | 1 | - | 4 | - | 5 | 7 | 18 | -11 | 7 |
| 10 B71 | 10 | 1 | - | 2 | - | 7 | 10 | 22 | -12 | 5 |

EB/Streymur-B71:

# Nú er málið at vinna greipuna

**Avbjóðingin er stór hjá botnliðnum á Sandi, sum nú skal spæla á útivølli ímóti steypavinnaranum og oddaliðnum í landskappingini, sum enn ikki hevur tapt í ár**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað ber ikki til at finna størri spenni, enn tað verður, tá ið B71 mikukvøldið fer at vitja við Margáir. EB/Streymur er ósigrað og sjey stig frammanfyri næsta kappingarneytan. B71 er botnlið. Sandoyingar hava bara vunnið eina ferð higartil í ár. Tað var 27. apríl, tá ið B71 á heimavølli vann 3-1 ímóti Skála.

Spurningurin er so, hvussu væl fokuseraðir steypavinnararnir verða ímóti botnliðnum. B71 hevur áður staðið seg væl á útivølli ímóti EB/Streymi. Í EB/Streymi er málið eftir tveir steypasigrar at vinna fyrsta FM heitið. Um tað skal eydnast, so er neyðugt at vinna á heimavølli ímóti botnliðnum.

Høgni Zachariasen og Mikkjal Thomassen eru framvegis skaddir. Brian Olsen hevur fingið møguleikan á miðvøllinum seinastu ferðirnar, og hann hevur staðið seg væl.

Hjá B71 er Eirikur Poulsen heima. Miðverjin Fabio Vieira varð skaddur ímóti HB og er tískil ikki tøkur. Jóhannes Jensen hevur ikki fingið vant orsaka av skaða, men tað verður vónað, at hann verður við. Patrick Sunday, sum hevur verið í B36, skal nú spæla við B71. Men hann er ikki tøkur í dag orsakað av skaða.




*Á pappírinum er EB/Streymur risa-favorittur, men B71 hevur higar til í ár staðið seg væl móti oddaliðnum, og so er tað eisini ein spurningur um fokus, nú EB/Streymur júst hava vunnið steypakappingina*


## Tekniska Skúla í Tórshavn tørvar 2 faklærarar

Skapandi umhvørvi

Talan er um størv á:

- Trædeildini og Eldeildini

Vit ynskja at umsøkjarar:

- hava hug og hegni at arbeiða við ungdómi
- eru hugaðir fyri broytingum
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni
- duga at loysa trupulleikar, tá ið á stendur
- eru framfýsnir og kunnu geva íblástur at menna arbeiðsplássið

Vit vænta at umsøkjarar hava:

- sveinabræv
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika innan økið

Vit bjóða:

- spennandi og avbjóðandi størv í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning.



Umsøkjarar, sum hava viðkomandi hægri útbúgving, kunnu hava fyrimun. Eisini kunnu umsøkjarar til eldeildina, sum hava hollan kunnleika innan veikstreymsøkið, hava fyrimun.

Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skulu vera Tekniska Skúla í Tórshavn, postrúm 3239, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. juni 2008.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Sørin Hansen, starvsfólkaleiðara, á tlf 568070

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN
www.tst.fo